## DAGSINS MEINING

# Sosialurin í Eysturoynni

Í dag letur Sosialurin upp blaðdeild í Eysturoynni. Hetta er triðja verkætlanin – roynd av sínum slag – hjá blaðnum at fáa betri fótafesti úti um landið. Fyri nøkrum árum síðani varð latin upp blaðdeild í Suðuroynni og í fjør varð sett á í Norðoyggjum. Nú er so túrurin komin til Eysturoynna.

Við hesum trimum redaktiónunum vil blaðið royna at gerast meira sjónligt um alt landið. Blaðið vil við hesum royna oftari at koma út til fleiri búpláss kring oyggjarnar. Nýggja tøknin og bøttu samferðsluumstøðurnar loyva fjølmiðlafólki hesum nógv betur.

Tað er greitt, at vit fara at halda fram á høvuðsredaktión okkara á Argjum sum higartil. Men lokaldeildirnar skulu vera okkara forlongdi armur. Tær skulu byggja brýr millum útjaðaran og miðøkið. Ein kann í ávísan mun siga, at tær skulu vera við til at geva blaðnum meira kjøt og blóð – meira viðkomandi og livandi innihald. Telefonjournalistikkurin er týðandi partur av arbeiðinum í dag, men ansast má eftir, at hann ikki tekur heilt yvirhond.

Fyri at kunna greiða frá og endurgeva hendingar og upplivingar, sum fara fram ymsa staðni í landinum – úr Sumba til Gjáar, úr Kirkju til Bíggjar – betri, so er neyðugt at vera í nærumhvørvinum, á staðnum. Tað er hetta, sum vit vilja við okkara lokalredaktiónum og tí "rullandi redaktiónini", sum er úti um landið dag um dag, viku fyri viku, mánað eftir mánað....

Nú er land okkara lítið og til ber at røkka nógvum plássum við bili. Eitt nú alla Eysturoynna. Tí vil onkur helst halda, at tað er óneyðugt at gera íløgur í høli og amboð í oynni. Her mugu vit bara taka í egnan barm og viðganga, at fjølmiðlafólk hava ringt við at fara út um høvuðsstaðin. Ein orsøk er so eisini, at arbeiðsorkan er avmarkað, og tí loyvir tíðin tí heldur ikki. Tað er hetta vit vilja hava bøtt um.

Vit hava so mett, at tað hevur stóran týdning fyri tilverugrundarlagið hjá eitt nú Sosialinum, at journalistar og fotografar og haraftrat marknaðarfólkini eru meira sjónlig um alt landið. Tað skal so aftur skapa eitt betri, fjølbroyttari og meira livandi blað. Royndirnar úr Suðuroynni og Norðoyggjum siga okkum, at hetta er rætta leiðin at fara.

Eysturoyggin er í besta blóma. Her grør um gangandi fót. Neyvan nakra staðni í landinum er so nógv virksemi sum her – av Toftum til Fuglafjarðar, úr Lorvík til Oyrar. Eysturoyggin og her ikki minst allur Skálafjørðurin er við at gerast ein nýggjur savnandi og mennandi miðdepil í landinum. Og sjálvandi mugu fjølmiðlarnir fylgja við í slíkum útviklingi.

Tað skal vera vón okkara, at eysturoyingar taka væl ímóti nýggju blaðdeildini í Saltangará. Vit vilja so gera okkara til, at áhugamál, ynski og vónir hjá øllum eysturoyingum koma at endurspegla seg aftur í tí arbeiði, sum verður lagt úr hondum higani. Skrivstovan fer at verða opin stóran part av tíðini og skulu øll verða vælkomin at støkka inn á gólvið. Eisini til móttøkuna í dag frá klokkan 15 til 18.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Synd í javnaðarflokkinum?

**Dánial á Dul Jacobsen**



Í Sosialinum mikudagin 27. februar hevur Eyðólv Dimon grein við yvirskriftini "Óneyðugt við lóg um frískúlar". Ikki hissini herðindi, ið herja mannin. Eftir at hava víst til endamálsorðingina hjá fólkaskúlanum, sum snýr seg um andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði, spyr Eyðólv um, hví tað framvegis er ynski um at skipa frískúlar. Síðani kemur eitt brot, har tað er torført at finna hóskandi orð til at lýsa sínar kenslur við. Orð sum rasisma ella jødaforfylging tangera hugan. Brotið ljóðar: "Fyrst eru tað teir átrúnaðarligu frískúlarnir, sum ikki eru sameiniligir við endamálsorðing fólkaskúlans um tollyndi og andsfrælsi, og hetta leggi eg ikki í at koma við fleiri viðmerkingum til her, tí hesir skúlar fara at koma føroyska fólkaræðinum aftur um brekku, um teir sleppa at síggja dagsins ljós".

Samstundis sum hesi orðini í sjálvum sær sýna ábyrgdarleysa mótsøgn, so svara tey eisini spurninginum um, hví tað er neyðugt við frískúlum. Tað má verða ein fólkarættur hjá trúgvandi foreldrum at sleppa undan lærarum, sum siga, at tey við síni trúgv eru ein hóttan móti fólkaræðinum í Føroyum.

Nú er Eyðjólv Dimon ikki hvør sum helst. Umframt at verða lærari við føroyska fólkaskúlan, er hann eisini valevni hjá javnaðarflokkinum í Føroyum, so hugsast má, at hesi orð ikki bert standa fyri hansara egnu rokning. Javnaðarflokkurin er jú tann flokkur í Føroyum, sum í mestan mun markerar seg við pástandum um, at tað ikki eru uppstillaðu persónarnir, sum hava týdning, men heldur politikkurin og flokkurin. Um nú øll fólk í føroyum, sum hava størri áhugað í átrúnaði enn í politikki, venda javnaðarflokkinum bakið til komandi val, er lítið at ivast í, at synd verður í javnaðarflokkinum.

# Almennir barnagarðar

**Eivind Jacobsen**
*Strendur*



Nú norðingar og havnarmenn eru farnir at skriva um almennar barnagarðar, føli eg meg noyddan at siga mína meining. Onkur sigur meg verða komandi havnarmann, meðan onnur siga komandi klaksvíkingur. Nú kann lesarin meta sjálvur.

Tað er skeivt, at Almennir stovnar byggja barnagarðar. Sama er galdandi um privatar fyritøkur byggja barnagarðar. Orsøkin er, at um øll skulu verða líka fyri lógini, ber ikki til at feløg, almenn ella privat, byggja barnagarðar til síni arbeiðsfólk og lata kommunurnar gjalda rakst-urin. Skulu privat ella almenn feløg byggja og reka ansingarstovnar, skulu tey eisini gjalda raksturin.

Fyri betur at skilja hetta, kunnu vit gera eitt hugsa dømi: Um nóg nógvar fyritøkur byggja barnagarðar, noyðist kommunan at játta at gjalda raksturin og hevur ongar pengar til egnar stovnar. Tá verða tað bert starvsfólk hjá hesum fyritøkum, sum fáa síni børn ansaði. T.v.s. at starvsfólk hjá fyritøkur við fáum starvsfólkum ella lítlum kapitali, fáa ikki sama tilboð frá kommununi, sum onnur fáa. Hetta hugsaða dømi ger, at barnaansing verður bert veitt starvsfólki hjá ávísum fyritøkum. Sjálvt um dømi er hypotetiskt, eigur tað at takast við, tá avgerð verður tikin.

Kundi eisini hugsa mær at fingið at vita, um tað kann standa í upptøkutreytum, at foreldur skulu starvast hjá ávísari fyritøku fyri at fáa síni børn ansaði. Eri ikki løgfrøðingur, men eg lesi lógina soleiðis, at øll hava sama rætt at sleppa í ansing. Eg síggi onga heimild fyri at geva ávísum framíhjárætt.

**Tíðin komin til Pasningsgaranti**

Trupulleikin við barnaansing er í dag sera stórur. Flestu tosa, men eingin ger nakað. Tað kann ikki verða rætt, at kvinnur gevast at eta fisk, í royndini at fáa fremsta pláss á bíðilistanum. Tí vil eg mæla til, at vit seta í gildi eina lóg um pasningsgaranti. Hetta skal gerast í samráð við kommunurnar. Trupulleikin kundi verið loystur eftir fáum árum. Men tað treytar sjálvandi, at kommunurnar vísa góðan vilja og brúka sera nógvar pengar.

Eg dugi ikki at síggja at tað er rættvíst, at veita teimum hepnu eina tænastu, meðan onnur onga tænastu fáa. Lógin á økinum sigur, at øll skulu verða eins. Men sjálvandi sleppa tey á bíðilistanum, saman við teimum heimagangandi, at verða við at gjalda tænastuna fyri hini.

Havandi í huga, hvussu stór inntøkan hjá kommunum er í dag, er tað púra burtur við, at ein íløgukvota, uttan lógarheimild, skal forða fyri einari loysn á einum máli, sum nógv meta hevur stóran tídning.

Mín meining er annars, at har bíðilistin er longstur, er viljin minstur. Tí kann tað ikki verða rætt, at íbúgvar í øðrum kommunum skulu gjalda barnaansingina fyri kommunur, sum hava valt at raðfesta barnaansing aftarlaga. Fyrimyndarligt samstarv millum kommunur og ávís virkir er tekin um vánaliga politiska raðfesting.

# Tøkk Jørn Astrup Hansen

**Joan Ziskason**

Stóra tøkk til Jørn Astrup Hansen, fyri greinina "Kvit eller dobbelt", í Dimmalætting, 27. februar 2002.


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Tillukku við føroyameistaraheitinum

**Finnleif Guttesen**
*borgarstjóri*



Hjartaliga tilluku til TB-flogbóltskvinnurnar við føroyameistaraheitinum og harvið greipuna í 2002, tí steypavinnarar vóru tit seinasta vikuskiftið

Hetta hava tit fult uppiborið, tí við tykkara ótrúliga ídni har ungdómsarbeiðið hevur verið í hásætinum, var tað bert ein tíðarspurningur til tit vunnu bæði steypafinalu og føroyameistaraheitið.

At tykkara stríðsvilji skuldi geva hesi úrslitini í ár kunnu vit á Tvøroyri og í Suðuroy bert gleðast yvir, saman við tykkum.

At flogbóltsfelagið virkar fyrimyndarligt hava úrslitini gjøgnum nógv ár víst og at tað eru 150 virknir limir frá 7 ár og uppeftir vísur, at flogbóltsfelagið er eitt tað mest virkna felagið innan flogbólt í Føroyum. Við sínum ungdómsarbeiði hevur TB-flogbóltur víst og prógva, at eitt ítróttarfelag kann koma langt. Men vit skulu ikki gloyma tað stóra sjálvbodna arbeiði, sum verður gjørt, so øll, bæði spælarar, nevnd og tey sum annars stuðla hava stórt rós uppiborðið.

Eg vil vegna Tvøroyrar býrað ynskja spælarum og avvarðandi hjartaliga tillukku við føroyameistaraskapinum og "the douple", og góða eydnu framyvir.

# Karaktermorð 2

**Gunnar K Nattestad**



Ein skal vera varin at steina tá man býr í glashúsið verður sagt, men tað eru nøkur ið ikki halda seg hava fyri neyðini at taka við hesum setningi. Ein teirra er Høgni Hoydal. Hann fýrir ikki fyri at stempla onnur, men tá hann sjálvur verður avdúkaður so er tað persónsforfylging og tað ið verri er.

Aktuella málið er, hvørt danir hava skora kassan uppá at læna til Føroyar ella ikki. At tað er hoyrn fyri søgn at Karsten Hansen hevur, í minsta lagi incinuera at, danir heystaðu profit uppá føroyska neyð, tað kann einhvør fara inná heimasíðu Løgtingssins at lurta eftir.

At tað so ikki er so stuttligt at verða fangaður við skegginum í postkassanum er ein onnur søk og tí royna teir nú at vaska sær sum best.

Veruleikin er at danski statskassin við at taka okkara skuld, hevur spært okkum føroyingum eini 2-3% í rentu árliga. Hettar kemur fram sum munurin á tí „rating" ið Føroyar høvdu í mun til Danmark. Rating er ein alltjóða kredittmetingar-stigatalva har eitt land ella fyritøka, far ein karakter, alt eftir hvussu stórur vandin verur mettur at vera, við at læna til viðkomandi.

Sparingin vit hava havt av at danir blivu okkara lángevar, er millum 50 og 100 milliónir árliga. Hettar vita bæði Høgni Hoydal og Karsen Hansen, men hví skal man geva danskarum eitt herðaklapp, tá man í staðin kann sparka?

Tíðan verri, vísur hettar sag at vera regulin heldur enn undantakið hjá fleiri tjóðveldisfólki. Tað góða við ríkisfelagskapinum skal dyljast sum mansmorð, meðan tað negativa skal varpast út um allar geilar.

Høgni Hoydal segði m.a. tá fólkaatkvøðan var uppá tal, at "nú skuldu vit velja um vit vildu vera føroyingar ella danir". Altso, vrakaðu vit uppskot hansara, so vóru vit danskarar. Tóku vit undir, ja so vóru vit rættir føroyingar.

Apropos karaktermorð, so eru tað sanniliga onnur enn tey ið Høgni loypur á, ið duga kunstin.

# Gevst nú, Høgni

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Hvussu so víkir og vendir, so kann Høgni Hoydal ikki reingja sannleikan um rentuspurningin.

Nú er landsstýrismaðurin rættiliga farin í hernað fyri at mótprógva tað, ið komið er fram um rentuspurningin millum Danmark og Føroyar. Og hann ger tað við at stempla okkum onnur sum lygnarar.

Men eg skal vissa Høgna Hoydal um, at einki orð verður tikið aftur.

Havi enn einaferð lurtað eftir orðaskiftinum, sum var við 1. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2002, og eg kann mæla tí til, ið ivast, at finna fram til yvirlitið yvir røðararnar og lurta eftir seinru røðuni hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, og teim viðmerkingunum, ið vóru til røðuna.

Í sambandi við kreppuna tosar landsstýrismaðurin m.a.:

- um "manglandi hjálp" og "okursrentu" (hvussu kann tað so skiljast?)
- um hvussu føroyingar máttu gjalda aftur "við renturs rentu" (!!!)
- um donsku stjórnina, sum ikki fór inn fyrr enn neyðugt var at bjarga "sínum donsku kapitalistum", (men ikki eitt orð um, at landsstýrið bað um hjálp !).

Millum viðmerkjarnar var Karstin Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, ið greitt sigur tað, ið undirritaða hevurført fram, hóast Høgni Hoydal nú roynir at venda og snara tí. At Karsten Hansen síðani er ógreiður og blandar 2 ymiskar samráðingar saman, broytir ikki veruleikan..

Tann, sum lurtar eftir viðmerkingunum, hoyrir eisini fyrrverandi løgmann, Edmund Joensen, havast at Karsteni Hansen, tí tað hesin sigur er ósatt og heilt út av lagi. Seinri í orðaskiftinum sigur tjóðveldismaðurin Finnur Helmsdal í eini viðmerking til mín, at hann tekur undir við Karsteni Hansen, tí tað stendur rimmarfast, at rentusatsurin, ið goldin varð, var nógv hægri, enn hann átti at verið, og hann nevnir minst 2 % !

Hví fer Høgni Hoydal í hernað fyrst nú?

Hví rættaði hann ikki teir báðar ella gjørdi meira við málið tá?

Og hví kom Karsten Hansen ikki sjálvur við rættleiðing beinanvegin?

"Ein og hvør er ósekur til tað mótsætta er prógvað", sigur Høgni Hoydal nú. Ja, prógvið hava vit í orðaskiftinum, og tað hjálpir einki at royna at gera onnur til lygnarar.

Høgni Hoydal, sum hevur formanað onnur um at "útspilling spillir fólkaræðið" átti at dugað betur.

Annars skal eg eisini rættleiða hann, tá hann sigur, at hetta er at leggjast eftir persónum, ið hava aðra politiska meining. Hetta er als ikki so! Í hesum føri havi eg víst á og gjørt vart við, at landsstýrismenn hava sagt ósatt. Tað skal standa fast!

Sosialurin má lesa uppá:

# Undirgrundin stendur í heimastýrislógini - og hon tók 17 ár at yvirtaka

**Høgni Hoydal**



Hevði ongantíð ætlað at svarað eini oddagrein í Sosialinum.

Tær tykjast í 4 ár at hava havt sama endamál, sum vit nú síggja í fullum blóma frá sambands- og javnaðarflokkinum, beint upp undir løgtingsvalið: At leggja eftir Tjóðveldisflokkinum við øllum hugsandi ákærum um líkt og ólíkt.

Hesar ákærur hava bert eitt í felag: Tær hava onki við veruleikan at gera, og grundgevingarnar gerast alt meiri skeivar og villeiðandi.

Men Sosialurin fer nú so langt í oddagreinini 26. februar at siga føroyingum, at onki nýtt er í politikkinum hjá nýggju donsku stjórnini. Tað hevur ongantíð verið nakar sum helst trupulleiki at yvirtaka málsøki til Føroya, sigur Sosialurin. Eisini tey, sum ikki standa í heimastýrislógini.

Hetta er bert ein trupulleiki, sum Tjóðveldisflokkurin hevur skapt, heldur Sosialurin uppá.

**Kenna ikki søguna um undirgrundina**

Sum dømi nevnir Sosialurin undirgrundina og sigur, at undirgrundin stóð heldur ikki í heimastýrislógini. Og har var líkasum onki problem, sambært Sosialinum.

At Sosialurin, sum annars hevur fingist mest við oljumál av øllum føroyskum fjølmiðlum, skal borðreiða við slíkum ósannindum, er nærum grátiligt. Og alt bara fyri at seta Tjóðveldisflokkin í ringt ljós.

Tí vil eg fegin upplýsa, at "Ráevni í undirgrundini" standa á lista B í heimastýrislógini. Og hóast hetta tók tað 17 ár at taka málið yvir!

Tað vita øll, sum tíma at seta seg inn í málið ella at lesa uppá.

**Javnaðarflokkurin vildi sleppa undirgrundini**

Sosialurin veit eisini, at um ikki Tjóðveldisflokkurin hevði hildið rimmarfast, so var javnaðarflokkurin til reiðar at gera eina "grønlendska loysn", har undirgrundin hevði verðið umsitin í felag millum Føroyar og Danmark. Og tá hevði verið álvarsligur vandi fyri, at okkara fólkarættur til egið tilfeingi, hevði ligið í buktini.

Vit hava sostatt í løtuni heimastýri á undirgrundini. Vit umsita málsøkið "ráevni í undirgrundini" og gera lógir og reglur.

Men ognarrættin til okkara egnu undirgrund – sum vit ongantíð hava givið nøkrum - staðfesta vit ikki fólkarættarliga, fyrr enn vit hava skipað okkum sum sjálvstøðuga tjóð og hava fingið viðurkenning sum ein statur millum aðrar.

**Stór broyting í Føroyapolitikkinum**

Tað er vorðið munandi léttari at yvirtaka málsøki í samskifti við danskar myndugleikar síðani stjórnarskiftið í Danmark, og síðani vit fingu onnur umboð úr Føroyum á fólkating. Eisini tey málsøki, ið ikki standa í heimastýrislógini – tildømis rættarskipan, dómstólar, útlendingamál og ávísa vinnulívslóggávu.

Men evsta valdið á landinum staðfesta vit ikki, fyrr enn vit sjálvi taka fullveldi.

So einfalt er tað – uttan mun til hvussu ofta Sosialurin roynir at snara veruleikanum við støðugt løgnari og skeivari grundgevingum.